# Løgreglan ongar trupulleikar av Fish Fair




*Løgreglan í Runavík hevur ongar sum helst trupulleikar havt av altjóða fiskivinnu-og alistevnuni, North Atlantic Fish Fair. - Vit eru ongantíð boðsendir til nakað, og tað taka vit sum tekin um, at alt hevur gingið væl. Eg haldi, at fyrireikararnir hava megnað hetta tiltak ógvuliga væl, sigur Kurt Rasmussen, løgreglumaður. Schandorff Vang, sum eisini hevur verið á vakt, er samdur við starvsbróðurin*

## Fokuseraðu uppá turrleggingina

EFTIR FISH FAIR
*Vilmund Jacobsen*

Onkur helt, at fjølmiðlarnir í ov stóran mun høvdu hug at fokusera ov nógv uppá turrleggingina av Norrønu, tá ið tað gjørdist greitt, at eingin skeinking fór at vera aftur við matinum umborð.

Tað er møguligt, at heldur nógv bleiv gjørt burtur úr hesum. Hinvegin argaði tað mong – fyri ikki at siga øll, tú møtti á North Atlantic Fish Fair, at føroyska rúsdrekkalógin er so ótíðarhóskandi, at tey, sum ótu umborð á Nørrønu, ikki skuldu kunna leska sær við eini øl ella víni afturvið tí annars so frálíka matinum umborð.

Tað er ikki at taka munnin ov fullan, um sagt verður, at tað serliga vóru føroyingar, sum hildu hetta vera størstu skomm av verðini.

317 barrir

Í staðin fyri at loyva matstovunum umborð á Norrønu at skeinkja øl og vín, gingu fólk í Rúsuna í Saltangará at keypa sær løgir, sum tey partvís bóru oman í kømrini umborð á Norrønu.

Í práti við Ólav Hovsgarð, skipara á Norrønu, segði hesin, at í staðin fyri at loyva skeinking á matstovuni, vóru nú 317 barrir umborð á Norrønu.

Hann hevði tó ikki hug at tosa meira um hetta, tí rúsdrekkalógin er ein politiskur spurningur.

Freistandi er tó at spyrja, hvar moralurin hjá okkum føroyingum er.

**- Eg haldi, at fyrireikararnir hava megnað hetta tiltakið ógvuliga væl, sigur løgreglan í Runavík, sum als ongar trupulleikar hevur havt av, at út við 10.000 fólk vitjaðu á North Atlantic Fish Fair týsdagin, mikudagin og hósdagin**

EFTIR FISH FAIR
*Vilmund Jacobsen*

Á seinasta stevudegnum, hittu við løgreglumannin, Schandorff Vang, sum í sínum arbeiði var fram við á North Atlantic Fish Fair.

Schandorff visti at siga, at alt hevði gingið væl, og at løgreglan ongar trupulleikar hevði havt av hesum stóra tiltaki, sum nú at enda dróg út við 10.000 fólk til Runavíkar kommunu.

Hann segði, at hóast nógv fleiri bilar enn vanligt koyrdu og parkeraðu í økinum, elvdi hetta als ikki til nakrar trupulleikar, tí parkeringsviðurskiftini á havnalagnum eru so góð, og her er so rúmligt.

Spurdur, um løgreglan hevði havt trupulleikar av rúsaðum fólki, segði Schandorff, at tað høvdu tey ikki.

- Vit eru ikki boðsendir til nakað sum helst, og eingin hevur sovið í detentiónini.

Løgreglumaðurin visti tó at siga, at onkur er tikin fyri at koyra við kenning, meðan stevnan hevur verið.

### Gekk stak væl

Sosialurin hitti eisini løgreglumannin, Kurt Rasmussen, sum var á vakt fríggjanáttina, tá ið stevnan var liðug, og Norrøna skuldi loysa um 04-tíðina.

Vit spurdu hann, hvussu henda seinasta náttin gekk, og hvussu tað mundi gangast at fáa alt fólkið, sum vitjaði umborð á Norrønu hesa seinastu náttina, í land aftur.

- Eg vil siga, at løgreglan hevur ongar sum helst trupulleikar havt av hesum stóra tiltaki. Vit eru ongantíð boðsendir til nakað, og tað taka vit sum tekin um, at alt hevur gingið væl.

Kurt Rasmussen heldur, at fyrireikararnir hava megnað hetta tiltakið ógvuliga væl.

- Teir hava sjálvir skipað fyri, at bilar, sum vitjaðu økið, sluppu at parkera, og vit mugu siga, at hetta hevur eydnast teimum til fulnar, tí her hava als eingir trupulleikar verið.

### Øll í land aftur

Spurdur, hvussu tað mundi gangast at fáa fólk í land aftur av Norrønu, tá ið hon skuldi loysa um 04-tíðina, sigur Kurt Rasmussen:

- Vit hava einki hoyrt um, at alt ikki hevur gingið væl, og vit vórðu ikki boðsendir til nakrar sum helst uppgávur.

Løgreglumaðurin sigur at enda, at tveir bilførarar eru tiknir við kenning í økinum, meðan North Atlantic Fish Fair hevur verið hildin.



# Verkafólkið skal hava ágóða av búskaparvøkstrinum

**-Við hesar samráðingar skal verkafólkið fáa ágóðan av tí búskaparvøkstri, sum farin er fram, við einari lønarhækking, ið munar. Vit koma at halda fast við kravið um eina munandi hækking av tímalønini, tí tað er ikki lønin hjá verkafólkinum, ið koyrir nakað á heysin í samfelagnum og ei heldur skaðar hon nakað kappingarføri segði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í 1. Mai røðu síni á Vaglinum í Havn. Vit prenta røðuna**

1. MAIRØÐA



*Borgarin skal sigla sín egna sjógv, og einki samhaldsfesti ella solidaritetur skal vera í samfelag okkara - tað er politikkurin hjá verandi samgongu*

- Nú halda vit so aftur 1. mai – alheims arbeiðaradagin. Hvar vit hava møguleika at gera upp støðuna hjá verkafólkinum her á landi. Land okkara hevur seinasti árini verið fyri stórum búskaparvøkstri, reypað hevur verið av frá samgonguni, um allan tann pening, ið landskassin kundi leggja til góðar og seta inn í landsbankan, ja, tað er so nógvur peningur, at vit føroyingar hava ráð at lata 1 mill. kr. um dagin av blokkinum aftur til danska statin. Men halda tit, at nakar av hesum samgongulimum hevur hugsað um ella virkað fyri, at verkafólkið skuldi fáa sín part av hesum búskaparvøkstri ella tey veiku og eldri í okkara samfelag? Nei, hvørki verkafólk ella hesi síðst nevndu hava fingið ágóðan av tí búskaparvøkstri, ið fram er farin hesi seinasti árini.

Tí krevja vit verkafólk, at við hesar samráðingar skal verkafólkið fáa ágóðan av tí búskaparvøkstri, sum farin er fram við einari lønarhækking, ið munar.

Í løtuni eru vit í tí støðu, at øll arbeiðarafeløgini stríðast fyri at fáa betur sømdir fyri okkara verkafólk, men sum altíð gongur hetta ógvuliga strilti. Tað vísir seg, at verða mest sum ómøguligt at fáa nakran munandi bata fyri okkara verkafólk.

Og tá fakfeløgini hjá okkara verkafólki krevja nakrar krónur í hækking uppá tímalønina verða allar forðingar gjørdar fyri, at tað ikki verður ráð til nakað sum helst.

Nú verður sagt, at reallønin hjá løntakaranum skal verða vaksin við heili 8% og skattalættin, ið verður givin, skal gera keypiorkuna hjá tímaløntum uppaftur betur.

Men lat tað verða gjørt greitt, at tey tímaløntu hava ikki fingið størri keypiorku seinasti árini og skattalættin er bert eitt eiti fyri lágu inntøkurnar - skattatrýstið er hægri nú enn í 1997.

So Arbeiðsgevarafelagið skal gera sær heilt greitt, at vit koma at halda fast við kravið um eina munandi hækking av tímalønini, tí tað er ikki lønin hjá verkafólkinum, ið koyrir nakað á heysin í samfelagnum og ei heldur skaðar hon nakað kappingarføri.

So Arbeiðsgevarafelagið kann nísta og tvína sum tað vil, vit fara at halda fast um krøv okkara – tí tey eru rættvís.

### Almenni arbeiðsmarknaðarpolitikkurin

Hyggja vit uppá Arbeiðsmarknaðarpolitikkin hjá sitandi samgongu má ásannast, at førdi politikkurin ikki er til nakran frama fyri okkara verkafólk.

Karensdagarnir blivu avtiknir í juni 2001, so verkafólkið fekk sjúkrapening frá fyrsta degi og vóru tey tá líkastillað við aðrar lønmóttakarar, eitt nú tey alment løntu.

Men tíverri toldi sitandi samgonga ikki, at landskassin skuldi gjalda karensdagar fyri verkafólkið. So broyttu teir lógina aftur, so nú eitur tað, at arbeiðsgevarnir skulu gjalda karensdagarnar. Hetta kemur so at ganga út yvir tey, ið eru veik. Eru tey ov ofta sjúk fáa tey sekkin, tað er tað fakfeløgini ávaraðu um, og tað hevur FAG boðað frá, at arbeiðsgevarnir koma at gera.

Hetta rakar bara verkafeløgini og limir teirra, umframt at tað órógvar samráðingarnar, tí arbeiðsgevararnir brúka tað sum eina økta lønarútreiðslu, men hesin trupulleiki rakar ikki tey alment løntu fakfeløgini og limir teirra. Soleiðis ger politiski myndugleikin missmun á løntakarunum.

Næsta kupp samgongan gjørdi móti teimum tímaløntu var at broyta barnsburðarlógina og skerja rættin hjá teimum tímaløntu og øðrum lágløntum, so hesi mistu eina einar 3.000-4.000 kr. um mánaðin.

Politiska rákið her á landi fer alt meira tann vegin, at løntakarar missa inntøkur og aðrar tænastur. Tí tær almennu tænastunar skulu privatiserast við brúkaragjøldum, hetta verður gjørt í smáum, so brúkarin ikki skal merkja tað.

Sjónvarpsgjaldið er hækkað við 500 kr. um árið, ikki tí at tað hevur givið okkum betur sjónvarp. Sjúkrakassin er hækkaður, ansingargjøld av børnum eru hækkað. Og soleiðis kann ein halda áfram, um hvussu tann politiski myndugleikin leggur byrðu oman á byrðu á løntakaran.

Í 5 ár er tann almenni sektorurin vaksin við 1,1 milliard kr., uttan at tað er komið teimum sjúku og veiku til góða – tey, sum veruliga hava brúk fyri umsorgan og hjálp.

Prísansing er ongin og ongin brúkarapolitikkur, so handilsfólk hava frítt at gera sum teimum listir við vøruprísinum, ið støðugt hækkar og ger tað alt dýrari at liva fyri tað vanliga verkafólkið.

### Ágangur móti fakfelagsrørsluni

Sjálvt um umboð fyri allar samgonguflokkarnar hava úttalað, at teir ikki vildu brúka fútarættin mótvegis fakfeløgunum, so hevur samgongan 2 ferðir hesi seinastu árini brúkt fútarættin í stríði sínum móti fakfeløgunum.

Fyrsta málið var tá Fíggjarmálaráðið og Fiskimálaráðið fingu fútarættin at seta fútabann móti tí aftursvari, sum Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevði givið Fiskimálaráðnum, tá ráðið noktaði at brúka limir í Navigatørfelagnum, sum vóru í føstum starvi hjá Fiskiveiðieftirlitinum.

Aðru ferð var, tá Heilsumálaráðið brúkti fútarættin móti Havnar Arbeiðsmannafelag. Hóast vøkru orðini um, at samgonguflokkarnir ikki vildu brúka fútarættin móti fakfeløgunum, so koyra málini framvegis í rættinum, og eingin av samgongufløkkunum hevur tikið stig til at taka aftur hesi mál. Hetta eru dømi um, at samgonguflokkarnir als onga virðing hava fyri føroysku fakfelagsrørsluni.

### Vanlukkutryggingarlógin

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur fyri stuttum lagt uppskot um nýggja vanlukkutryggingarlóg fyri Tingið.

Hóast fakfeløgini áður hava gjørt vart við, at neyðugt er at slík lóggáva tryggjar teimum, sum koma til skaða eitt endurgjald, sum dekkar veruliga inntøkutap teirra, so tykjast fakfeløgini at tosa fyri deyvum oyrum, tí landsstýrismaðurin leggur upp til, at vanlukkutryggingin bert skal dekka 80 % av einari vanligari arbeiðsmannaløn, og hetta fer at gera, at tey, sum koma til skaða, ikki kunnu klára fíggjarligu skyldur sínar.

Hendan lóggáva fer fyrst og fremst at raka tey lægstløntu, tí tað eru tey, sum ikki hava møguleika fyri at spara upp at standa ímóti við, um slíkur vanlukkutilburður hendir, og tí er vandi fyri at tann, sum fær arbeiðsskaða má fara frá hús og heimi.

Er tað veruliga tað sum okkara politikarar ynskja?

### Fólkapensiónin

Verandi samgonguflokkar hava klárt meldað út, at tað almenna ikki í framtíðini kemur at hava ráð at gjalda pensiónina ella eftirlønina hjá føroyska løntakaranum, men at fakfeløgini sjálvi mugu skipa eftirløn fyri egnu limir sínar.

Hetta er vælkendur Fólkaflokspolitikkur, sum hinir samgonguflokkarnir fult út tykjast at hava tikið undir við.

Borgarin skal sigla sín egna sjógv, og einki samhaldsfesti ella solidaritetur skal vera í samfelag okkara - tað er politikkurin hjá verandi samgongu.

Hetta merkir, at samgongan við vilja roynir at halda fast við tann stættarmun, sum er í samfelag okkara, eisini tá fólk røkka pensiónsaldur - t.v.s. at tey, sum í vinnuførum árum hava forvunnið sær mest av peningi skulu ikki hjálpa til at gjalda til aldurdómin hjá teimum sum ikki hava havt somu møguleikar, men munurin í lønarinntøkunum skal halda áfram tá fólk fara um pensiónsaldur og skulu liva av eftirlønini har ein fær kr. 5.000,00 um mánaðin og ein annar fær kr. 25.000,00 um mánaðin. Eitt tílíkt samfelag ynskja verandi samgonguflokkar.

Samstundis tykjast okkara politikarar at royna at tryggja sær og sínum bæði høga løn og høga eftirløn, og hvør skal gjalda ? - jú tað er vanligi skattagjaldarin, t.v.s. tú og eg sum skulu gjalda, og nú tykjast politikararnir ikki at halda at landskassin ikki hevur ráð, tí tá tað er teirra egna løn og eftirløn, so ber alt til.

Nú heldur onkur kanska, at eg eri í so politisk, men sum umboð fyri løntakaran hava vit bæði rætt og skyldu at tala at einum politiskum stýri, sum hetta í stýrir Føroya landi í dag, ein kann gott siga, at ongin stýring er í landinum, tað hevur verið klandur og stríð av hesi samgongu, síðan hon fekk valdið. Fólkaflokkurin fær allan sín borgarliga politikk ígjøgnum uttan at Tjóðveldisflokkurin maktar at støðga teimum. Landsstýrisfólk verða skift út aðru hvørja løtu, so ein gøla avloysir ta næstu á politiska vígvøllinum - hetta er so tað politiska stýrið í Føroyum í løtuni.

Til seinast skal mín áheitan verða til øll verkafólk kring land okkara, latið okkum standa saman, saman eru vit sterk og tá skulu vit nokk vinna stríðið sjálvt um tað kann blíva hart í endaspurtinum av hesum samráðingunum.